## GÍ vann stórsigur á AB

Tað hevur gingið væl hjá AB í fleiri venjingardystum í ár, men leygardagin noyddist liðið av Argjum rættiliga at lúta í dysti í Gøtu. GÍ vann dystin heili 6-0, og harvið fingu uppflytararnir eina smakkiroynd av, hvussu tað kann ganga í Formuladeildini, um liðið ikki spælir upp til sítt besta hvørjaferð.



## Bendtner vil aftur til Arsenal

Danski álopsspælarin Nicklas Bendtner er eitt heitt navn í enskum fótbólti. Bendtner er sáttmálabundin við Arsenal, men hetta kappingarárið hevur hann verið leigaður út til Birmingham. Har hevur tað gingið framúr væl hjá unga dananum, og nú er áhugin stórur hjá fleiri feløgum fyri at keypa danska spælaran. Men Bendtner sjálvur sigur nú, at hann vil aftur til Arsenal, tá ið leiguavtalan við Birmingham endar í summar.

StÍF-Neistin 32-29 (17-15)

# StÍF er enn við í finalustríðnum

**Neistin var var væl við at kalla allan dystin ímóti strandingum, men at enda dró StÍF longra stráðið og vann dystin. Við sigrinum halda teir enn fast í vónini um at røkka finaluni um meistaraheitið**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Strandingar hava havt takið á Neistanum í hesum kappingarárinum. Ikki tí, munurin á liðunum hevur ikki verið so stórur í teimum trimum dystunum, sum hesi bæði liðini høvdu leikt undan dystinum sunnudagin, men felags fyri undanfarnu dystirnar var, at StÍF hevði vunnið teir allar. Hetta var tó ikki einasti felagsnevnarin fyri dystirnar, tí StÍF hevði nevniliga vunnið allar undanfarnu dystirnar við einum máli, so munurin kann ikki sigast at hava verið tann heilt stóri millum liðini bæði.

Setningurin var tó greiður hjá báðum liðunum undan dystinum í ítróttarhøllini á Skála sunnudagin. Um tey ætlaðu sær at halda fast um vónina at røkka einum plássi í FM-finaluni, so skuldi dysturin sunnudagin vinnast.

### Gekk javnt á

Í fyrra hálvleiki var alt, sum bendi á, at hetta fór at gerast ein sera spennandi dystur. Liðini byrjaðu í eini høgari leikferð, og tað var týðiligt, at hvørki av liðunum hevði hug at lata hitt liðið sleppa fram um.

Tað vóru tó gestirnir úr Neistanum, sum komu heldur betur frá byrjan, men ikki gekk long tíð, fyrrenn strandingar høvdu javna út og høvdu lagt seg á odda. Neistin bleiv tó við at hanga í heimaliðnum, og um miðjan hálvleik stóð StÍF aftur á jøvnum millum liðini.

Mitt í hálvleikinum var tó eina lítla løtu líkt til, at StÍF ætlaði sær frá Neistanum. Teir løgdu seg á odda við tveimum málum, men enn einaferð svaraði Neistin aftur, og so gekk aftur javnt á ímillum liðini tað mesta av hálvleikinum.

### Dysturin tóktist avgjørdur

Síðstu løtuna av fyrra hálvleiki kom tó aftur gongd á strandingar. Teir vunnu seg nakað fram við gestunum, sum nú tóktust hava ávísar trupulleikar at fylgja við heimaliðnum. Hetta gagnnýtti StÍF til at leggja seg á odda við trimum málum tætt undan steðginum, men móti endanum fekk Neistin minka um munin, soleiðis at bert tvey mál vóru á muni í steðginum.

Síðstu løtuna av fyrra hálvleiki vístu strandingar sera gott spæl, og fyrstu løtuna eftir steðgin hildu teir fram við góða spælinum, sum teir høvdu víst ímóti endanum av fyrra hálvleiki. Tríggjar minuttir inn í seinna hálvleik høvdu teir nevniliga økt enn meir um leiðsluna, soleiðis at munurin nú var fimm mál, og nú tóktist dysturin brádliga vera avgjørdur.

Neistamenn høvdu tó sæð hvønn veg tað bar, og næstu løtuna løgdu teir nógv fyri at fanga StÍF aftur. Hetta tók ikki langa tíð hjá Neistanum, tí góðar tveir minuttir seinni høvdu teir skora fýra ferðir, meðan strandingar m.a. vóru raktir av eini útvísing, og so var aftur bert eitt mál á muni millum liðini.

Nú gekk javnt á næstu langu løtuna. Onkuntíð førdu strandingar, so førdu neistamenn, og langt út í dystin var slett einki avgjørt. Strandingarnir vístu seg tó at



*Neistamenn góvu StÍF ein skarpan gang, men seinastu løtuna snaraðu strandingar um posan*

løtuna, og tá fimm minuttir vóru eftir at leika, høvdu teir vunnið sær eina tvey mála leiðslu. Neistin megnaði at minka um munin niður í eitt mál, men síðstu minuttirnar avgjørdu strandingar alt til egnan fyrimun. Teir fingu nevniliga síðstu tvey málini í dystinum, og so tryggjaðu teir sær ein 32-29 sigur á gestunum úr Neistanum.

Við sigrinum er StÍF enn væl við í stríðnum um eitt finalupláss, og dysturin ímóti Kyndli næsta vikuskiftið kann gera av, hvat av hesum báðum liðunum endar í finaluni.

### FAKTA

**StÍF-Neistin 32-29 (17-15)**
**Málskjúttar:**
**StÍF:** Finnur Hansson 8 (1), Mortan Hansen 7, Sveinur Justinusen 6, Andre Danielsen 4, Leivur Justinusen 3 (1), Jacob Jónsson 2, Borgar Danielsen 1, Bárður Danielsen 1
**Neistin:** Blagoje Buha 6, Roar Dalsgarð 6, Jens Mohr 4, Áki Mørk 4 (1), Tróndur Kragesten 3, Birgir Poulsen 3, Dann Thorleifsson 2, Karl Oddmar Rasmussen 1
**Brotskøst:** StÍF 3, Neistin 1

VÍF-H71 43-28 (21-13)

# VÍF vann trygt

**VÍF vann tryggan sigur á hoyvíkingum, tá hesir vitjaðu í Vestmanna, og nú skal ganga illa hjá vestmenningum, um teir ikki skulu enda í FM-finaluni**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Toppur og botnur møttust í Vestmanna, tá oddaliðið, VÍF, tók ímóti botnliðnum, H71. Undan dystinum var VÍF stórur favorittur at vinna dystin, og vestmenningarnir livdu eisini væl og virðiliga upp til hesa tolluna.

Dysturin var ikki nógvar minuttir gamal, fyrrenn VÍF hevði vunnið seg nøkur mál fram um hoyvíkingar, og sum fyrri hálvleikur leið, øktu vestmenningar bara meir og meir um munin. Tá liðini fóru til hálvleiks var dysturin í roynd og veru avgjørdur, tí tá førdi VÍF longu við átta málum.

Onkur mundi helst vænta, at dysturin fór at gerast eitt sindur javnari í seinna hálvleiki, men soleiðis bleiv ikki. VÍF bara økti enn meir um munin, og her var alt, sum bendi á, at VÍF fór at vinna stórsigur á hoyvíkingum.



*Eingin sum helst ivi var um úrslitið, tá botnur vitjaði hjá toppi í Vestmanna*

Tá dómarnir bríksladu fyri seinastu ferð hevði VÍF ein tryggan 15 mála sigur, og við sigrinum vístu teir samstundis, at teir eru komnir aftur á rætta kós eftir tapið síðsta vikuskiftið.

### FAKTA

**VÍF-H71 43-28 (21-13)**
**Málskjúttar:**
**VÍF:** Agnar Joensen 13 (3), Sámal Joensen 10 (1), Ingi Olsen 6, Sjúrður Poulsen 4, Harald Bjørgvin 2, Joen P. Høgnesen 2, Áki G. Olsen 2, John Zachariassen 1, Rói Lamhauge 1, Rúni Joensen 1 (1), Regin Joensen 1
**H71:** Esbern Patursson 9 (3), Poul K. Dam 5, Dánjal Tórgarð 5, Niels V. Niclasen 4, Janus Sørensen 3, Gunnar Bláberg 2
**Brotskøst:** VÍF 5, H71 3
**Útvísingar:** VÍF 4, H71 1
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánjal Samuelsen